
Fáið meira burturúr
við okkara fiskiútgerð

TrawlTec
Til trolarar
- Mátar trýst og longd av veiri
- Justerandi alarmur til longd og trýst
- Syrgjur fyri grafiskum trýst upplýsningum
- Sett í trolarar frá stødd 14 m. til 130 m. longd
- Klárar "twin rigging"
- Veiðusensorum

DNG
Teldustýrd snella til snellubátar
- Finnur botnin automatiskt og byrjar at fíla
- Hálar automatiskt inn tá fiskur er á
- Eisini manuellar fíling sýstem
- Serstakt tilevnaður moturur við fáum mótstandum
- Línutrumman er direkta bundin til motor aksan

LineTec
Til línubátar
- Trýst- og longdarmátari til línuspøl
- Mátar færtin á spælinum og longdina á línu
- Telur fisk sum kemur upp um lúnningina
- Allir upplýsningar verða registreraðir
- Agnteljari - mátar týdningarmiklar agnprossuni upplýsningar
- Allir upplýsningarnir í línufisking verða givnir skiparanum
- LineTec gevur langtíðarfisking meira gagn

Útgerð til línubátar
- Línurullir
- Línuspøl stór og smá til ymisk endamál
- Línustokkar
- Komplet línusystemir
- Agnskerari
- Agntrakt
- Komplettar egnimaskinur
- Komplett system fyri bæði lítlar og stórar bátar
- Splittarir
- Og onnur útgerð

VAKI DNG
Umboð fyri VAKI-DNG: Fa. Jóannes F. Dahl, Maskinsmiður, Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000, dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar
Akralind 4 • IS-200 Kópavogur • Ísland
www.vaki.is



i
Sosialurin

Sosialurin
www.sosialurin.fo



...your packaging supplier
Plastic and label manufacturer



We supply the industry with:
- Solid board
- Corrugated board
- Carton
- Packaging machines etc.

DANAK
DNV
VEST PACK

Vest Pack p/f. · FO 350 Vestmann · Tel 42 41 07
Fax 42 45 09 · e-mail: vestpack@post.olivant.fo





Conference Facilities
Suites
internet-connection in all rooms
Pizzacafé
Restaurant

Rest well at ...
HOTEL
Tórshavnar Sjómansheim
TÓRSHAVN
★★★
Tórsgøta 4 • P.O. Box 97 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 350 000 • Fax +298 350 001 • hotel@hotel.fo • www.hotel.fo




SKEIÐ Í PROSJEKTLEIÐSLU
GEVA ÚRSLIT!

Vit halda skeið í prosjektleiðslu fyri øll áhugað.

Skeiðini innihalda ein ástøðiligan part og ein simulatiónspart har skeiðsluttakararnir fáa høvi at royna prosjektleiðslu-amboðini í praksis.

Skeiðið er í 2 dagar og til ber at hoyra nærri og/ella tekna seg hjá Virkisráðgeving.

*Skeiðini verða í Runavík og Klaksvík hesar dagar:*

**Runavík 9. og 10. juni** - mikudagur og hósdagur
*Tilmeldingarfreistin er fríggjadagin 28. mai 2004*

**Klaksvík 14. og 15. juni** - mánadagur og týsdagur
*Tilmeldingarfreistin er mánadagin 7. juni 2004*

VASTI 457171

SIMPRENTIS
Bryggjubakki 12 · FO-100 Tórshavn
Tel. +298 356600 · Fax +298 353101
Fartel. +298 556600
simprentis@simprentis.com · www.simprentis.com

Virkisráðgeving Ltd.
Consulting Firm
Postboks 26 · FO-600 Saltangará
Tel. +298 449591 · Fax +298 449592
Fartel. +298 219591
konsult@konsult.fo · www.konsult.fo




# Mugu leggja á annan bógv

**Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur, heldur, skulu vit vinna kappingarførið í fiskivinnuni aftur, verður neyðugt við umfatandi broytingum**

FISKIVINNA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Fiskivinnan í Føroyum má leggja á annan bógv.

Tað heldur Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur.

– Ein tann størsti trupulleikin í fiskivinnuni í Føroyum, er, at vit fyri ein part hava mist okkara kappingarførið.Og skal fiskivinnan í Føroyum fóta sær aftur, verður neyðugt við umfatandi broytingum.

Hann heldur at tað, at so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, er ein avleiðing av, at vit fyri ein part hava mist okkara kappingarførið.

– Tað ber ikki annað til enn at staðfesta, at kappingarførið hjá fiskivinnuni á landi, er rættiliga vánaligt, heldur hann.


*– Skulu føroyingar gera sær vónir um at fóta sær aftur í fiskivinnuni, mugu vit leggja dent á teir kappingarfyrimunir, vit hava. Og so mugu vit eisini lúkla tær treytir, marknaðurin setir og har mugu vit kanska taka í egnan barm, sigur Egil Olsen, fiskifrøðingur*



KÄRCHER
Vit eru einaumboð fyri Kärcher trýstspularum til ídna.
Vit umvæla eisini
TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn
Tlf. 313442
t-post: tm@post.olivant.fo


– Á summum økjum standa vit okkum ikki í kappingini við kina og onnur láglønarlond, og tí fer so nógvur fiskur óvirkaður av landinum.

Hann vísur somuleiðis á, at í Skotlandi er tímalønin ikki meiri enn eina helvt av tí, hon er í Føroyum og tí hava skotar tað ólíka léttari. Og tað er ein orsøk til, at teir framvegis hava ráð at keypa fiskin, sum føroyingar ikki hava ráð til at keypa.

Hartil hava skotar ein stóran heimamarknað, sum teir selja nógv til.

Og so skera teir við hond, sum teir hava drúgvar royndir í og sum gevur teimum nógva úrtøku burtur úr fiskinum.

Teir fáa eisini eitt slag av avriksløn.

Men hjá føroyskum virkjum er vónleyst at tosa um avriksløn omaná eina tímaløn uppá yvir 100 krónur.

– Tó er tað eisini so, at akkurát sum føroyingar, merkja eisini skotar kappingina frá láglønarlondunum rættiliga væl, sigur Egil Olsen.

## Mugu leggja fiskivinnuna um

Hinvegin heldur hann eisini, at tað ber væl til hjá føroysku fiskivinnuni at fóta okkum aftur.

– Men hjá føroyingum at royna at taka kappingina upp við láglønarlond sum Kina, heldur hann er púra meiningsleyst.

– Tað er ein kapping, sum er tapt frammanundan, heldur hann.

Tí heldur hann, at skal fiskivinnan í Føroyum vinna kappingarførið aftur og sostatt fóta sær aftur, verður tað tískil neyðugt at leggja fiskivinnuna um, bæði á landi og á sjógvi.

– Tað verður neyðugt við bygnaðarbroytingum fyri at fáa fiskivinnuna á føtur aftur, heldur fiskivinnufrøðingurin.

Hann heldur, at ein broyting, hann hugsar um í føroysku fiskivinnuni, er, at hon má skifta frá frystum vørum til meir av feskum vørum.

Hetta sær hann sum eina avgjørda fortreyt fyri at vinna marknaðin aftur og fyri at sleppa burturúr okkara støðu sum rávøruútflytarar, sum vit fyri ein stóran part eru í dag.

Men skal tað eydnast, verður tað ein fortreyt, at vit fáa betri samband ímillum Føroyar og umheimin.

Hann hugsar bæði um betri sjóvegis samband og um loftvegis flutning av fiski.

Í løtuni er ein stórur partur av føroysku feskfiskaframleiðsluni bygdur á, at fiskurin skal koma á marknaðin mánamorgun.

– Tað er verri enn so nóg gott. Tað verður neyðugt at hava samband við marknaðin fleiri ferðir um vikuna. Og høvdu vit kunna sent feskan fisk á marknaðin hvønn dag í vikuni, hevði tað verið tað allerbesta og okkara allarbesta kort, tá ið hugsað verður um kappingarførið.

– Hetta er so eitt øki, har láglønarlondini als ongan møguleika hava fyri at kappast ímóti okkum, tí tey liggja ov langt burtur.

Egil Olsen vísir á, at íslendingar flúgva fisk á marknaðin í Evropa hvønn einasta dag, so tað er avgjørt nakað sum loysir seg, hóast tað kanska er dýrt.

Tað er eisini hetta, sum føroyingar hava at kappast ímóti, sigur hann.

Egil Olsen ivast heldur ikki í, at hetta hevði verið ein støða, har føroyingar høvdu verið rættiliga sterkir í kappingini.

## Sleppa undan millumliðum

Somuleiðis heldur Egil Olsen, at vit skulu selja tær fesku vørurnar beinleiðis til handilsketurnar fyri at sleppa undan øllum millumliðunum, vit hava í dag.

– Fiskurin úr Føroyum endar hjá handilsketunum kortini. Okkara mál eigur at vera, at vit skulu virka hann sjálvi, heima í Føroyum og selja hann beinleiðis til keturnar fyri at sleppa undan millumliðunum.

– Sum er, fer fiskurin óvirkaður av landinum til skotar at virka og at selja víðari til keturnar.

Men fyri at selja beinleiðis til handilsketurnar, eru tað vísar treytir, vit mugu lúka og tað eiga vit at innrætta fiskivinnuna í Føroyum eftir.

– Men spurningurin um flutningin er eisini trupulleiki, sum tað er avgjørt neyðugt at loysa, leggur hann afturat so at fiskurin kann fáast á marknaðin meiri regluliga, helst hvønn dag.

– Vit liggja ikki so langt frá Skotlandi so kanska kann ein partur av hesum trupulleika verða loystur við sjóvegis flutningi.

Men hann heldur ikki, at sjóvegis flutningur er nóg mikið í sær sjálvum.

– Vit vera noydd til at taka upp eitt kjak upp í álvara um loftvegis fiskaflutning ímillum Føroyar og marknaðin í Evropa.

Hann sigur, at tað er ikki vist, at tað er neyðugt við nýggjum flogvølli fyri tað.

*framhald á síðu 20*